Eyðgunn Samuelsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um matvøruútbúgving, settur Jenisi av Rana, landsstýrismanni við uttanríkis- og mentamálum (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu nógvir kokkalærlingar verða í dag sendir til Danmarkar í skúla?
2. Hvussu nógv kostar hetta landskassanum og vinnuni árliga?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at útvega játtan til, at verandi kokkaútbúgving á Tekniska Skúla í Klaksvík kann uppstigast, soleiðis at til ber at taka alla útbúgvingina í Føroyum?
4. Um landsstýrismaðurin ætlar at hækka játtanina, nær kunnu vit so vænta, at hetta verður gjørt?

Viðmerkingar:
Matvøruútbúgving hevur nógv ár á baki í Klaksvík. Skipskokkaútbúgving varð staðsett á Klaksvíkar Sjómansskúla, og í dag er matvøruútbúgvingin staðsett á Tekniska Skúla í Klaksvík. Nýggjur bygningur er bygdur til endamálið, og varð hesin tikin í nýtslu í 2016. Í dag bjóðar skúlin fýra matvøruútbúgvingar: gastronomhjálpari, gastronomur, føðsluhjálpari og føðsluatstøðari.

Sambært miðlunum verða allir kokkalærlingar sendir til Danmarkar í skúla, hóast skúli er bygdur til endamálið í Klaksvík. Umboð fyri matstovuvinnuna siga seg, sambært fjølmiðlunum, ikki brúka skúlan í Klaksvík men ynskja, at skúli skal setast á stovn í Tórshavn.[1]

Í dag er støðan tann, at tað ber til at taka 30 av 47 vikum skúlagongd í Klaksvík. Skúlin hevur í fleiri umførum ynskt at fingið størri játtan, soleiðis at øll skúlagongdin kann takast í Føroyum, men enn hevur hetta ikki borið á mál. Stóri áhugin fyri mati og matmentan og vaksandi ferðavinnan gera tað upplagt at uppstiga og upprøfesta hetta økið í Føroyum.

Hugsandi er, at tað gagnar bæði samfelagnum og teimum lesandi, at skúlin í Klaksvík verð upprøfestur, soleiðis at vit menna førleikar her heima og gera meira brúk av teimum kørmum og hentleikum, ið longu eru til taks. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi 2. februar 2021

Eyðgunn Samuelsen

[1] https://bladid.fo/by-date/2021-01-30#edition-article-38338